# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Arsenal spældi men tapti

**Talan var um fantastiskt undirhald á Anfield. Arsenal var liðið við betra spælinum, men Liverpool skoraði fýra av teimum seks málunum, sum fullu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Tapið kemst av eini skeivari dómaraavgerð og persónligum mistøkum. Eg havi sæð støðuna umaftur, og hatta var ikki í nær námind einum brotssparki.

Arsene Wenger var alt annað enn blíður, tá hann mátti staðfesta, at tað verður Liverpool – og ikki Arsenal – sum skal spæla hálvfinalu í Champions League.

Hendingin, sum Wenger sipaði til, hendi bara fimm minuttir fyri leiklok. Adebayor, sum annars hevði misnýtt ein stjóra av teimum stóru, hevði júst javnað eftir framúrskarandi forarbeiði av Theo Walcott. Men Arsenal-spælararnir høvdu ikki fingið armarnar niður, fyrr enn dómarin dømdi brotsspark, tí hann metti Kolo Touré hava felt innskifta Ryan Babel.

Tað gav ein enda, har Arsenal tveitti alt fram í royndunum at javna, og so kundi Babel í yvirtíðini staðfesta sigurin.



*Gerrard hevur júst sent brotsspark í netið til 3-2, og saman við Johan Arne Riise fegnast hann um, at Liverpool enn einaferð hevur vunnið seg fram millum tey fýra bestu í Europa*

*Mynd: Polfoto/PA*

### Fantastiskur fótbóltur

Men undan hesum høvdu áskoðararnir á Anfield sæð ein dyst, sum heilt víst fer at teljast millum klassikararnar í europiskum høpi.

Arsenal skuldi skora, um teir skuldu hava nakran møguleika, og teir settu seg tungt á dystin frá byrjan. Longu eftir 13 minuttum kundi Diaby eisini skjóta teir framum, og næsta korterið helt Arsenal fram við at stýra dystinum.

Ein framúrskarandi stútari frá Hyypia javnaði tó málini, og tá Torres eftir 24 minuttum í seinna hálvleiki snaraði sær á, áðrenn hann høgdi bóltin upp í málhornið, var tað Liverpool, sum kanska ikki heilt uppiborið var á sigurskós.

Arsenal hevði kanska ikki longur heilt sama trýstið, sum teir høvdu fyrsta hálva tíman, men teir strongdu tó støðugt á. Og málið frá Adebayor var heldur ikki meira, enn teir høvdu uppiborið.

Men tað gjørdist so ikki til meira enn ein vakran deyða, tá Gerrard kundi umseta brotsspark til mál.

### Eyðmjúkur Gerrard

Eftir dystin ásannaði Liverpool-skiparin, at teir fyri tað nógva bert vóru næstbesta liðið á vøllinum.

- Talan var um eitt flott liðavrik frá okkum. Skal eg vera rættvísur móti Arsenal, so spældu teir okkum av vøllinum, men tíbetur megnauð vit kortini at gera tað, sum skuldi til, segði Gerrard við miðlarnar eftir dystin.

Sjálvur helt Gerrard, at talan var um ein tann vánaligasta dystin, sum hann hevur spælt fyri Liverpool, men tað munnu viðhaldsfólkini nú ikki leggja tað heilt stóra í. Tí við 3-2 málinum gjørdist hann stóra hetjan, sum enn einaferð sendi Liverpool millum tey fýra bestu í Europa.

## FAKTA

**Chelsea-Fenerbache 2-0 (1-0)**
(Chelsea víðari við 3-2)
1-0: Michael Ballack, 4.
2-0: Frank Lampard, 87.

**Liverpool-Arsenal 4-2 (1-1)**
(Liverpool víðari við 5-3)
0-1: Abou Diaby, 13
1-1: Sami Hyypia, 30
2-1: Fernando Torres, 69
2-2: Emmanuel Adebayor, 84
3-2: Steven Gerrard (br.), 85
4-2: Ryan Babel, 90.

## Chelsea stýrdi seg víðari

**Miðvallarstjørnurnar vóru málskjúttarnir, tá Chelsea í kvøld vann 2-0 á turkiska Fenerbache**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Europiska ævintýrið hjá Fenerbache endaði á Stamford Bridge í gjárkvøldið. Fenerbache hevði annars eina 2-1 leiðslu við sær til enska høvuðsstaðin, men tað tók bert Chelsea og Michael Ballack knappar fýra minuttir, áðrenn hetta varð sett upp á pláss.

Við 1-0 leiðslu hevði Chelsea fyrimunin, tí teir høvdu skorað á útivølli, og tí noyddist Fenerbache nú longur fram á vøllin. Men hóast teir høvdu bóltin meira, so eydnaðist teimum sjáldan at koma sær fram til teir heilt stóru møguleikarnar.

Og hinvegin lúrdi vandin alla tíðina fyri, at Chelsea punkteraði dystin við enn einum máli. Hetta hendi eisini, tá Fenerbache móti dystarenda royndi at flyta fólkið longur fram. Tað gav betri rúm hjá Chelsea, og so kundi altíð vandamikli Frank Lampard senda næsta seymin í kistuna hjá Fenerbache.

Turkisku meistararnir hava tó onga orsøk at vera ónøgdir við sítt avrik í kappingini. Tað eru hóast alt bert 20 mánaðir síðani, at teir noyddust norður í Atlantshavið til Tórshavn at spæla undankappingardyst móti B36. Men við at spæla seg millum tey átta bestu í Europa er neyvan tann heilt stóri vandin í fyri, at slíkur undankappingardystur aftur verður neyðugur.

# Finalan er stóra málið




Saman við Jón Bjarnasyni og Peturi Heðin á Fløtti eru fýra føroyskir svimjarar í hesum døgum í Manchester í Onglandi, har HM í svimjing fer fram.

Nakað HM-heiti verður talan neyvan um, men vónirnar eru, at Pál Joensen kann svimja seg fram til finaluna. Pál er undan kappingini styrkismettur sum nummar 9 á 1.500 metra teininum í frísvimjing, og tí kann málið røkkast, um vágbingurin svimur til sítt allarbesta.

Umframt Pál Joensen eru Kári á Høvdanum, Shaila millum Garðarnar og Mona Simonsen við í kappingini.

Eurosport sendir beinleiðis frá HM-kappingini í Manchester, og tí ber til at fylgja við, tá føroysku svimjararnir eru í hylinum.

**-mørk**